## Spottað í Århus

Føroysku tónleikararnir á SPOT-festivalinum í Århus fingu sera góð ummæli eftir teirra framførslur. Eivør Pálsdóttir, Teitur Lassen og Lena Andersen vóru við, og tey megnaðu øll at gera vart við sín tónleik.

– Eftir eina fína byrjan á konsertini, gjørdist lagið enn betur, tá ið føroyska sirenan Eivør Pálsdóttir kom á pallin. Við gittara, trummu, einari rødd á hædd við Bjørk og Annisette og við strúkarum í bakgrundini sang Eivør við fullari orku so mann næstan kundi stúra fyri, at bygningurin fór at rapa, skrivar ummælarin Ole Rosenstand.

## Samfelags-tænastu á útoyggj

- Hví ikki senda fólk, sum skulu inn at sita fyri rúsdrekkakoyring, út á onkra útoygg at gera samfelagstænastu í staðin? Tey høvdu verið ein stór hjálp hjá okkum, samstundis sum tey fingu nakað meiningsfult at fara upp til.

Tað segði Tummas Frank Joensen úr Skúvoy á útoyggjastevnuni, sum varð hildin í Svínoy.

Sum dømi um arbeiði til hesi fólk nevnir hann rásirnar í berginum, sum treingja til ábøtur, skera upp haga og velta, grava veitir, hegna og mangt annað.

–Tað mátti verið munandi meir meiningsfult at ganga úti í náttúruni og gera okkurt til nyttu enn at sita í Jónas Bronksgøtu, og gløða inn í ein gráan vegg, sigur Tummas Frank.

## Holið skotið ígjøgnum

Norðoyatunnilin verður skotin ígjøgnum leygardagin 25. juni. Jógvan við Keldu, landsstýrismaður, festir í fjúsið til seinasta skotið í Norðoyatunlinum. Ogspreingingin 130 metrar undir Leirvíksfirði er startskotið til veruligu niðurteljingina til koyrandi er undir Leirvíksfirði.

– Hetta minnir meg aftur á stórar hendingar, sum vóru avgerandi fyri framburðin í Klaksvík. Eg vil líkna hetta saman við Elverkið á Strond, sum varð bygt í 1931 og fyrstu havnaútbyggingina í Klaksvík í 1937, sigur Jógvan við Keldu.

Arbeiðið at gera Norðoyatunnilin hevur gingið væl, og roknað verður við, at tunnilin kann takast í brúk í mai mánaði 2006.

*[ Juni ]*



*Tey kongaligu fingu eina góða móttøku allastaðni, sum tey komu kring landið, og tað var einki yvir at dylja, at Mary Krúnprinsessa, sum vitjaði í Føroyum fyri fyrstu ferð, var populerast millum fólk*

# Mary stjól myndina allastaðni

**Øll vildu síggja Mary krúnprinsessu, tá ið tey kongaligu vitjaðu í Føroyum. Børnini vóru forlipt uppi í nýggju prinsessuni, og eisini tey vaksnu vildu royndu at troka seg fram at Mary. Tey kongaligu vitjaðu kring landið í nakrar dagar**

Stór mannfjøld var savnað í Vágsbotni í Havn, tá ið kongaliga fylgi kom til Havnar. Tað var eisini í høvuðsstaðnum, at almenni parturin av ferðini hjá Margrethu Drotning, Heindrikki prinsi, Fríðrikki krúnprinsi og Mary krúnprinsessu byrjaði.

Steðgurin í Vágsbotni var eitt tað besta høvi hjá havnarborgarum at heilsa upp á kongaligu gestirnar, og tað sást eisini aftur. Mannfjøldin var rættuliga stór, og nógv børn vóru komin oman á keiina og veittraðu bæði við Dannebrog og Merkinum. Eisini í bygningunum kring Vágsbotn var nógv fólk at síggja, sum stóðu í vindeyganum og royndu at fáa eyga á kongaligu gestirnar.

Tey kongaligu vitjaðu á nógvum plássum kring landið. Tey vóru stóran part av tíðini saman, men tað vóru eisini fleiri løtur, har tey yngru fóru í sína ætt og tey eldru í sína.

Nógv útlendsk fjølmiðlafólk vóru í Føroyum í sambandi við ferðina, og sambært teimum var eingin ivi um, hvør var mest áhugaverdur fyri teirra lesarar og hyggjarar, tí fjølmiðlafólkini fylgdu í stóran mun við Fríðrikki og Mary á ferðini í Føroyum.



» Eg havi ein góðan gerandisdag í Danmark saman við manni mínum, vinum og kenningum, men Føroyar og familjuskapurin liggja altíð í bakgrundini. Tað fer ongantíð burtur. «

*- Annika Hoydal, songkvinna*

» Ein prædikumaður segði einaferð, at hann hevði skift 10.000 prædikur við ein sálm, tí at ein prædika festir seg sjáldan í minnið eins og tónleikur. Tónleikurin er ein so ómetaliga týðningarmikil partur av lovsongi og gudsdyrkan sum heild. «

*- Russ Taff, gospelsangari úr USA*

**Todi Jónsson verður stórliga fagnaður í Parkini í Keypmannahavn, tá ið hann sigur farvæl við viðhaldsfólkini hjá FCK. Todi fer nú til Noregs at spæla.**